# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Kyndil-StÍF 25-17 (11-7):

# Steypaliðið er út



*Høgni Klein er sjálvandi ein stórur styrktur, men Kyndil er meira enn bara ein spælari. Eftir eina sera trupla byrjan er liðið við at finna aftur á slóðina, og nú eru teir mest sum til reiðar at spæla steypafinalu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fyri fyrstu ferð síðani ár 2000 verður StÍF ikki partur av mansfinaluni í steypakappingini. Teoretiskt er møguleikin enn til staðar, men í praksis verður mest sum ógjørligt at vinna átta mál inn aftur móti Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skuldi tað vera nakar, so mátti tað verða Kyndil. Tær ferðirnar StÍF hevur tapt steypafinaluna, sum teir hava verið fastur partur av átta ár á rað, hevur snávingarsteinurin itið Kyndil.

Og tað æt hann eisini hesaferð, tó at stopp-skeltið nú varð sett upp í hálvfinaluni.

Kyndil vantnevnliga burtur úr strandingum, tá fyrra hálvfinalan millum liðini var á skránni hóskvøldið.

Frá byrjan var tað heimaliðið, sum setti dagsskránna, og tá teir stutt fyri hálvleik veruliga skræddu seg leysar, gjørdist spurningurin einvíst, hvussu stórur stórur sigurin skuldi verða.

**Steypaævintýrið av**

Tá avtornaði, gjørdist talan um átta mál, og tað er við nærum 100% vissu nóg mikið hjá Kyndli, um tað ikki gongur heilt og fullkomuliga galið í returdystinum á Skála.

Og hjá teimum grønu er einki at ivast í, at hetta er stóri møguleikin at bjarga kappingarárinum. Undan árinum varð tað sagt at vera ivasamt, um Kyndil yvir høvur fekk mannað lið, og tað vóru fleiri, sum høvdu at rista við høvdinum, tá fleiri av veteranunum í felagnum aftur traðkaðu til at taka eitt tørn í fremstu røð.

Men so hvørt, sum úrslitini eru betrað, eru smílini hjá mótstøðuni vorðin minni. Ein Høgni Klein vil altíð gera góðan mun, og nú hann eisini er í ferð við at finna røttu venjingarstøðuna, er tað ein veldugur styrkur hjá Kyndli. Fleiri av hinum spælarunum eru eisini sterkir profilar í landskappingini, og nú spæliloyvið hjá Lars L. Black eisini er komið í rættlag, er Kyndil eitt lið, sum hevur sterkar menn á øllum plássum. Og hóast breiddin kanska kundi verið størri, er liðið í øllum førumført fyri at bjóða teimum flestu av.

Og tað eru teir grønu altso eisini til reiðar at gera tann 7. februar. Líka mikið um móstøðan tá eitur KÍF ella Neistin.

### FAKTA um dystin

**Kyndil-StÍF 25-17 (11-7)**
**10 min:** 5-3
**20 min:** 7-6
**40 min:** 15-10
**50 min:** 20-13
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Bárður Johannesen 6(1), Høgni Klein 6, Josef Abrahamsen 4, Rani Ellingsgaard 4, Janus Einar Sørensen 2(1), Tummas Pauli Hanusarson 2, Hans Arni B. Thomsen 1
**StÍF:** Alexandur Johansen 5(3), Cristos Preda 5, Bárður B. Danielsen 2, André F. Danielsen 2, Bent Djurhuus 1, Mortan Hansen 1, Rúni Johansen 1
**Brotskøst:** Kyndil 4, StÍF 4
**Útvísingar:** Kyndil 3, StÍF 5
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

---

Stjørnan-Neistin 33-22 (17-10):

# Eingin ivi um finaluplássið

**Stjørnan gjørdi arbeiðið mest sum liðugt, tá tær í fyrru hálvfinaluni móti Neistanum vunnu stórsigur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Klaksvíkingar kunnu longu nú gera seg til reiðar at fara til Havnar tann 7. februar. Við 11 mála sigri í fyrru hálvfinaluni móti Neistanum slerdi Stjørnan nevnliga rimmarfast, at tær so sanniliga ætla sær at fáa fatur á Coca-Cola steypinum aftur í ár.

Spenningurin í KÍ-høllini varð punkteraður mest sum alt fyri eitt. Gaman í fekk Neistin tey bæði fyrstu málini, men so stóð Stjørnan fyri restini av undirhaldinum, og eftir góðum 20 minuttum stóð 13-4 á talvuni.

Og so var annars ikki tað stóra, sum Neistin fekk gjørt fyri at økja um spenningin. Stjørnan hevði fult tamarhald á tí, sum eftir var av dystinum. Og hóast tað enn resta 60 minuttir, áðrenn hálvfinaluuppgerðin móti Neistanum er av, so er væl eingin sum helst ivi um, at samlaði vinnarin av uppgerðini eitur Stjørnan.

### FAKTA um dystin

**Stjørnan-Neistin 33-22 (17-10)**
**10 min:** 8-4
**20 min:** 13-4
**40 min:** 25-13
**50 min:** 30-20
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Dianne Møller 8, Durita Ljósstein 7, Simona Petersen 5(1), Una Olsen 5, Durita Mikkelsen 3(1), Bára S. Klakstein 2, Durita Christophersen 2(1), Edith Hansen 1
**Neistin:** Annika Ljósstein 7(1), Rakul Augustinussen 4(1), Tordis Tróndarson 4, Unn Kragesteen 3, Elin Stakksund 2, Nicoleta Radu Hansen 1, Stine Mikkelsen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 3, Neistin 4
**Útvísingar:** Stjørnan 4, Neistin 4
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr